# oysn við tunli



Oyvindur Brimnes, stjóri í Landsverki og Fríðgerð Heinesen, borgarstjóri í Leirvík



Bæði samgongu-og andstøðupolitikarar søgdu seg vilja taka undir við loysnini, sum leirvíkingar ynskja sær

# Føroyar eru eftirbátur

**– Vit hava ongan ferðslutrygdarpolitikk í Føroyum, og tað er orsøkin til skilaleysu støðuna, sum leirvíkingar koma í, nú Norðoyatunnilin letur upp. Orðini eigur Rúna Sivertsen, formaður í Ráðnum fyri Ferðslutrygd**

BORGARAFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

– Høvdu vit havt ein samtyktan ferðslutrygdarpolitikk, hevði støðan, sum leirvíkingar nú eru í, ikki komið fyri. Tað hevði nevniliga als ikki borið til at samtykt eina slíka verkætlan sum Norðoyatunnilin - uttan so, at ein heildarloysn, har eisini koyringin gjøgnum Leirvíkarbygd, var við.

Hetta segði formaðurin í Ráðnum fyri Ferðslutrygd, Rúna Sivertsen, á borgarafundi í Leirvík fríggjakvøldið.

Hon finst annars hvassliga at politiska myndugleikanum fyri ikki at taka ferðslutrygdina í nóg stórum álvara.

– Eg veit væl, at tey, sum eru sett at arbeiða við ferðslulógini í landsstýrinum, gera sítt besta. Men tað, sum eg finnist at, er, at raðfestingin av ferðslutrygdarpolitikkinum í Føroyum er so langt aftanfyri tað, sum vit síggja í okkara grannalondum.

Rúna Sivertsen sigur, at um vit hyggja inn á heimasíður hjá stjórnarráðum í grannalondunum, er eingin endi á øllum tí skrivaða tilfari, ið finst um ferðslupolitikk.

Men, vísir hon á:

– Á heimasíðuni hjá Vinnumálaráðnum, sum umsitir okkara ferðslumál, er einki at finna um hvønn ferðslupolitikk, landstýrið ætlar at føra, sigur hon.

Formaðurin í Ráðnum fyri Ferðslutrygd sigur, at grannalond okkara hava "satsað" nógv á øllum økjum fyri at økja um ferðslutrygdina.

– Hetta hevur givið úrslit, leggur hon dent á.

Rúna Sivertsen vísir á, at í nógv ár hevur Svøríki ligið á odda, tá ið ræður um ferðslutrygd, og nú eru bæði Noreg og eisini Danmark væl á veg at fáa talið av deyðsog álvarsligum ferðsluvanlukkum niður.

– Men her hjá okkum verður ikki gjørt nóg mikið, og hetta sæst tíverri aftur í syndarligu og álvarsligu ferðsluvanlukkunum, sum í Føroyum eru nógv fleiri í mun til fólkatalið enn í okkara grannalondum.

Formaðurin í Ráðnum fyri Ferðtrygd leggur áherðslu á, at tað er avgerandi neyðugt við fullum áhuga frá politiskari síðu fyri at fáa lyft ferðslutrygdina í Føroyum upp hægsta stig.


Áarvegur 4-10 • Postsboks 107 • FO-110 Tórshavn
Telefon 31 32 33 • Fax 31 52 50 • hafnia@hafnia.fo
www.hafnia.fo

TÆNARI



Hotel Hafnia søkir eftir tænara at byrja 1. marts 2006



**Førleiki**
- Yrkislærdur tænari
- Ábyrgdarfullur & lagaligur
- Tænastuhugaður
- Málbera seg á donskum & enskum

**Starvið**
- À la Carte á høgum støði
- Menning av tænaranæmingum
- Fundar- og skeiðvirksemi
- Ábyrgd eftir førleika

**Vit bjóða**
- Eitt áhugavert og avbjóðandi starv í altjóða umhvørvi
- Góðar arbeiðsumstøður
- Fasta vaktarskipan
- Førleikamenning
- Løn eftir avtalu

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Peter Hentze, matstovuleiðara

Umsókn við avriti av prógvum og ummælum, skal sendast til:

*Hotel Hafnia*
*Áarvegur 4 - 10*
*FO-100 Tórshavn*
*hafnia@hafnia.fo*

Umsóknir skulu vera okkum í hendi innan 20. februar 2006.

**HOTEL HAFNIA** er eitt altjóða 4-stjørna hotell, við 57 kømurum, 5 fundar- og veitsluhølum, matstovu og lounge.

Hotellið er væl vitjað av handils- og ferðafólki úr øllum heiminum, og hetta er við til at seta dám á livandi umhvørvið.

Vit eru 45 fólk, ið dagliga starvast við at veita Føroya bestu tænastu til gestir okkara.



Hotel Hafnia ★★★★
*Hotellið í miðbýnum*
HOTEL HAFNIA

www.sosialurin.fo
Leyst starv á Sosialinum




## Marknaðarfólk

Ert tú fyrikomandi, dugir tú væl at selja, ert tú álitandi, røkin og dugur at arbeiða sjálvstøðugt, so ert tú júst tann vit leita eftir.

Til marknaðardeild okkara søkja vit eftir starvsfólki, sum kann vera viðvirkandi til framhaldandi at menna inntøkugrundarlag okkara.

Lýsingarinntøkur eru ein týðandi partur av tilverugrundarlagnum hjá føroysku bløðunum, og tí leita vit støðugt eftir nýggjum hættum at menna hendan partin av fyritøkuni. Tí er tørvur á fólkum, sum duga at fáa og ikki minst arbeiða víðari við góðum hugskotum.

Í samstarvi við starvsfelagarnar á marknaðardeildini verður tú við í dagligu framleiðsluni av blaðnum. Herundir tilrættislegging av lýsingarátøkum, temabløðum og lýsingartilboðum.

Løn verður ásett sambært avtalu.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so er best at senda eina umsókn við frágreiðing um útbúgving og royndir til okkum. Ynskir tú at fáa meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Gudny Langgaard á tlf. 341823. Tað ber sjálvandi eisini til at senda teldupost á gudny@sosialurin.fo

Starvið verður at seta skjótast gjørligt. Umsóknarfreistin er 17. februar, og skal umsóknin saman við viðkomandi skjølum sendast til:

**Sosialurin**
**Marknaðardeildin**
**Postsmoga 76**
**110 Tórshavn**

*Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blaði. Umfram tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.*